# Toyota nýggjheitir í Klaksvík

Leygardagin 16. mai verður opið hús hjá Reyni Service í Klaksvík í sambandi við at tvey nýggj Toyota modell eru komin á marknaðin, minibilurin Toyota iQ og nýggjasta modellið av Toyota Avensis.

Toyota iQ er ein minibilur, sum er minni enn 3 metrar langur. Talan er um tann minsta minibilin til fýra persónar á marknaðinum. Bilurin verður gjørdur bæði sum bensin og diesel.

Nýggur Toyota Avensis er eisini komin á marknaðin. Talan er um triðju generatión av Avensis, sum er ein sera týðandi bilur hjá Toyota og ein av teirra mest seldu bilum.

Bilarnir, sum verða sýndir fram í Klaksvík, eru Toyota iQ við bensinmotori og Avensis í bæði bensin og dieselútgávum sum sedan og staioncar. Toyota iQ kostar úr 165.850 og Avensis kostar úr 258.850. Bæði Toyota iQ og Avensis fingu fimm stjørnur í evropeisku EuroNCAP-krasjtestunum.

Opið verður frá kl. 10-16 leygardagin hjá Reyni Service í Klingrugarði í Klaksvík.

*mg*



*Toyota Avensis sedan*



*Toyota Avensis stationcar*



*Minibilurin Toyota iQ*



# Góð ráð til bileigarar

Magn hevur fingið eina nýggja heimasíðu, sum er ein samskiftis- og kunningarplattformur til teirra kundar, samstarvsfelagar og fjølmiðlar.

Á heimasíðuni eru m.a. góð ráð til bileigarar, bæði hvat sjálvum bilinum viðvíkur og í samband við koyring í útlandinum.

Í sendingini Bilradio hósdagin kl. 16.05 er samrøða við Leif Hovgaard frá Magn um nýggju heimasíðuna.

## Bilradio á Rás2

### Endursent leygardagin kl. 11.00

Sendingin Bilradio, sum verður send hósdagin kl. 16.05, verður endursend sum vanligt fríggjadagin kl. 8.00, men leygardagin verður endursent kl. 11.00 ístaðin fyri kl. 13.00.

